# Yvirlýsing

## um

## Samstarv um at fremja tilmælini í "Tí góðu tilgongdini"

Arbeiðsbólkur við umboðum frá Autismufelagnum, Kommunufelagnum, Psykiatriska deplinum, Sernámi og Almannaverkinum hevur gjørt tilmæli um, hvussu til ber at skapa fortreytir fyri einari góðari tilgongd hjá børnum við autismu og familjum teirra. Tilmælið ber heitið "Tann góða tilgongdin".

"Tann góða tilgongdin" er ein skipaður samstarvsleistur, sum skal tryggja eitt dygdargott samskipað heildartilboð til børn við autismu og familjur teirra, har avvarðandi myndugleikar taka ábyrgd av sínum parti av tænastuni og taka ábyrgd av at samstarva og samskipa tænastuna við aðrar myndugleikar.

Landsstýriskvinnan við almannamálum, landsstýrismaðurin við mentamálum, landsstýrismaðurin við heilsumálum og formaðurin í Kommunufelagnum eru samd um at samstarva um og stremba eftir at fremja tilmælini, sum arbeiðsbólkurin vísir á í "Tí góðu tilgongdini".

Partarnir eru samdir um, at miða eftir, at skipanin, sum er lýst í tilmælinum, verður sett í verk 1. januar 2015, og at øll børn við autismu og familjur teirra frá 1. januar 2016 eru fevnd av hesi skipan. Semja er somuleiðis um, at skipanin skal endurskoðast í 2017.

Tórshavn, tann 9. september 2014

| | |
|---|---|
| Annika Olsen<br>landsstýriskvinna í almannamálum | Bjørn Kalsø<br>landsstýriskvinna í mentamálum |
| Karsten Hansen<br>landsstýriskvinna í Heilsumálum | Heðin Mortensen<br>formaður í Kommunufelagnum |

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ MENTAMÁLARÁÐIÐ HEILSUMÁLARÁÐIÐ Kommunufelagið